*Tíðindaskriv*

# Trý yrkislistafólk fáa listafólkaløn frá Mentanargrunninum í ár

Nevndin í Mentanargrunni Landins hevur nú viðgjørt umsóknirnar og tilmælini frá faknevndum til listafólkalønir. Í ár verða 3 listafólkalønir lætnar, og avgerð er tikin um at lata Brandi Patursson, myndlist, Búa E. Dam, leiklist, og Katrini Ottarsdóttir, bókmentir, listafólkalønina fyri 2018.

Endamálið við listafólkalønunum er at bøta um korini hjá yrkislistafólkum, og lønirnar verða veittar umsøkjara við støði í verkevni ella verkætlan, sum, eftir nevndarinnar meting, hava listalig ella faklig dygdareyðkenni.

40 umsóknir komu inn, og 5 faknevndir vóru settar at gera tilmæli til nevndina.

*Hesi vóru umboðini í faknevndunum:*

Bókmentir: Ann Ellefsen og Bergur Djurhuus Hansen.
Myndlist: Bárður Jákupsson og Solveig Hanusardóttir Olsen.
Tónleikur: Hans Pauli Tórgarð og Sunleif Rasmussen.
Leiklist: Kristina Sundar Hansen og Páll Danielsen.
Filmslist: Julia í Kálvalíð og Rókur Heinesen.

Nevndin fyri Mentanargrunn Landsins hevur avgjørt at fylgja tilmælunum frá trimum faknevndum. Her eru brot úr grundgevingum frá nevndunum til tey trý listafólkini:

**Brandur Patursson innan myndlist**
Brandur Patursson arbeiðir við skulpturum úr glasi og metalli, installatiónum, ljós- og videolist. Listin hjá honum eru slóðbrótandi, ikki bert í Føroyum men eisini í altjóða høpi. Seinastu árini hevur Brandur Patursson víst, at hann hevur skapandi megi á høgum stigi. Hansara listaligu avrik vísa, at hann er í støðugari menning og hevur ein djúptøknan kunnleika til tilfarið, sum hann arbeiðir við. Samstarvið við kend glaslistafólk úti í heimi boðar frá spennandi møguleikum og úrslitum, bæði fyri Brand sum listamann og fyri føroyska listaheimin.

**Búi E. Dam innan leiklist.**
Verkætlaninar hjá Búa Egason Dam eru fjølbroyttar og ymiskar, men allar eru ítøkiligar og grundaðar á dygdargóða leiklist, sum er viðkomandi fyri føroyska áskoðaran eins væl og leikararnar. Hetta megnar hann, tí verkætlaninar, sum Búi hevur gjørt farnu árini, og tær nýggju, sum hann í onkrum førum longu er farin í holt við, loysir hann bæði við at arbeiða einsamallur, tó mest saman við øðrum. Alla tíðina er dygdargóða leiklistin fyri eyga, og lýkur Búi Egason Dam tí krøvini um, at verkætlaninar røkka væl og virðiliga til øll 3 komandi árini. Bæði føroyska áskoðaranum og føroyska sjónleikinum at frama.

LÜTZENSTRØÐ 4 - FO - 100 TÓRSHAVN MENTAN@MENTANARGRUNNUR.FO TLF. 320842 - 220845

**Katrin Ottarsdóttir innan bókmentir.**
Umsøkjarin hevur drúgvar royndir sum yrkislistafólk, og hevur verið undangongufólk í føroyskari filmslist. Seinastu uml. 15 árini hevur hon lagt úr hondini fleiri verk, sum hava vakt ans og gjørt mun í føroyska samfelagnum. Hennara yrkingasøvn og stuttsøgusøvnini *Aftanáðrenn* og *43 bagatellir* hava verið nógv lisin og eru skrivaði á einum løttum og fangandi føroyskum máli. Ivaleyst ber eisini til at siga, at bæði yrkingar og stuttsøgur hava viðgjørt viðurskifti millum m.a. børn og foreldur á ein bersøgnan og originalan hátt, sum hevur kenst frískligur í føroyska bókmentaumhvørvinum.

Tórshavn tann 15 oktober.
Ingun í Skrivarastovu, forkvinna.